# Stuðulskonsert á Giljanesi

**United Voices, Tuxedo Rebels og Braquet fara at spæla á eini konsert til frama fyri útlandsferð hjá Vága Musikkskúla**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Tað eru foreldur og næmingar á Vága Musikkskúla, sum hava tikið stig til hesa stórslignu konsert, sum verður í høllini á Giljanesi, tann 7. mei.

Bólkarnir, sum fara á pallin hetta kvøldið, eru meiri ella minni kendir í føroyskum tónleikahøpi. United Voices nýta ikki nærri framløgu. Hetta er ein serstakliga væl samansettur sangbólkur, sum hevur bergtikið at kalla øll, sum hava hoyrt tey. Nú verður so høvi at hoyra tey framføra undurfullan tónleik í Vágunum.

Bólkurin Tuxedo Rebels er enn eitt óskrivað blað í føroyskari tónleikasøgu, men teir, sum manna bólkin eru kanska ikki so óskrivaðir. Talan er nevnliga um Knút Háberg Eysturstein og Petur Pólson, sum kanska eru betur kendir frá bólkum sum Gestir og Clickhaze. Teir hava í seinastuni arbeitt saman við komandi sololfløguni hjá Peturi Pólson, sum væntandi kemur í seinni í summar. Teir hava eisini spælt nakrar konsertir undir navninum Tuxedo Rebels, har teir fyri tað mesta framføra akustisk løg eftir navnframum fyrimyndum.

Tónleikabólkurin Braquet verður eisini at hoyra hetta kvøldið. Bólkurin hevur eftir sera stutta tíð megna at staðfesta seg sum eitt tað besta føroyska boðið upp á ein superharðan, rokkutan gospelbólk. Teir hava givið út sína fyrstu fløgu, teir hava luttikið á Prix Føroyum tvær ferðir, og teir hava eisini hitað upp fyri amerikanska stórbólkin Petra, sum varð og vitjaði í Føroyum herfyri. Arni Zachariassen, guitarúrmælingur og ein av oddamonnunum í Braquet, hevur eisini verið guitarleikari hjá klaksvíksbólkinum I Am.

Næmingar og kór úr Musikkskúlanum fara eisini at leggja fyri við onkrum hetta kvøldið, sum tykist at verða eitt sera spennandi og áhugavert kvøld.

### Einki tunnilsgjald

Leygadagurin 7. mei verður ikki bert karmur um stórsligna konsert í Ítróttarhøllini á Giljanesi, men henda sama dagin er onki gjald fyri at koyra gjøgnum undirsjóvartunnilin, so tað kann væntast at verða sera fólkamikið vesturi í Vágum henda dagin, so tað ræður um at vera skjótur ávegis, um einum skal roknast við at fáa pláss til hesa konsert.

Konsertin byrjar í Ítróttarhøllini á Giljanesi, leygarkvøldið 7. mei, klokkan 19.30.



# Ríkisflaggið - ella ketsjupp í eitt ?

**Kjakið um ríkisflaggið er lívligt, sambandsflokkurin vil ikki vita av tí, løgmaður sigur tað vera skemt, og hinir flokkarnir vita valla, hvat teir skulu halda. Dimmlætting harmast í oddagrein (!) um at føroyingar fáa ov lítið pláss og góðtaka tí ikki uppskotið!**

RÍKISFLAGG
*Tíðindaskriv*

Er tað so, at vit halda, at tað er fínasta slag at Ríkisfelagsskapurin er umboðaður í ST við Dannebrog? Meina vit nakað við tað, tá vit halda uppá at hesin góði felagsskapur skal umfata trý javnsett lond? Skulu vit kanska krevja av dønum, at teir kroysta Merkið og grønlendska flaggið uppí eitt hjørn, sum ketjsuppurin, tit vita, ella skulu vit gera eitt flagg í trimum hæddum við Merkinum, Dannebrog og grønlendska flagginum og hevja tað í húnar hátt uttan fyri ST?

Stóra Bretland hevur sítt felags flagg, Union Jack, í ST, men tá til dømis Ongland ella Skotland spæla fótbólt, tá veittra skotar og onglendingar við teirra egnu fløggum. Sjálvandi veittra vit við Merkinum, tá vit umboða okkara land og vit vinda tað eisini trúliga á stong heima hjá okkum, men vit kunnu ikki umboða Ríkisfelagsskapin við tí. Kanska veittrar Merkið uttan fyri ST ein góðan dag, men er tað ikki bara vanlig fólkaligheit at flagga við einum ríkisflagginum, til tann dagur kemur?

Vit ynskja øllum eitt lívligt kjak, og uppskotið kann, til løgmaður fær tað at hava við á næsta ríkisfund, síggjast á Listasavni Føroya, har longu nógv fólk hava verið og skoðað verkið.

Listasavnið er opið gerandisdagar millum 14 og 17, leygardag og sunnudag millum 14 og 18. Mánadag er stongt.

Blíðar flaggkvøður,
**Astri Luihn, Malan Marnersdóttir og Malan Johannesen**

Kílaskorin longutong



Ups...

Her er Herdis. Hon er flakakvinna. Í dag er Herdis farin at skera upsaflok til sveisiska marknadin. Herdis er ein ímynd av, at tad hevdi loyst seg hjá henni at tikid stødu til røttu trygdina.

Føroya Lívstrygging kann bjóda eina trygd, id júst nøktar persónliga tryggingartørvin. Skipanin eitur Persónlig eftirløn og er ein skræddaraseymad loysn vid bædi trygging og eftirløn.

Persónlig eftirløn er ein eftirlønarskipan við innbygdari trygging.
Persónlig eftirløn er grundað á, at ávíst gjald verður goldið inn í tryggingina, við skattafrádrátti.
Tá ið eftirlønin verður goldin út, stendur tær frítt fyri, hvussu hetta skal gerast.
Veljast kann ímillum at fáa alt goldið út í einum ella sum mánaðargjald.

LÍV Føroya Lívstrygging
Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn · Tel 311111 · Faks 351110
heimasíða www.liv.fo · teldupostur liv@liv.fo

REPROZ